Landsst‡ri› vanvir›ir tingi›

Jóannes Eidesgaard heldur ta› vera skeivt av landsst‡rinum at taka upp samband vi› NATO, tá tingi› fleiri fer›ir hevur samtykt, at vit einki skulu hava vi› NATO at gera

JOHN JOHANNESSEN

Forma›ur Javna›arfloksins tekur ikki undir vi›, at landsst‡ri› javnan er í sambandi vi› NATO um møguligt samstarv, tá løgtingi› fleiri fer›ir hevur samtykt, at vit skulu standa uttan fyri hendan felagsskap.

– Eg haldi ta› beinlei›is vera eina há›an móti tinginum, at løgma›ur og landsst‡ri› venda sær til NATO hóast hesa samtykt og uttan yvirhøvur at vi›gera verjupolitisku stø›u okkara í løgtinginum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Heldur seg til samtyktirnar

Jóannes Eidesgaard heldur seg ikki hava grundarlag at melda nakra grei›a stø›u út um framtí›ar verjupolitikkin hjá Føroyum í einari n‡ggjari ríkisrættarligari skipan.

– Sum tingma›ur kann eg bert halda meg til tær samtyktir, løgtingi› fleiri fer›ir hevur gjørt, og ta› er at Føroyar skulu vera uttan fyri NATO, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›ur Javna›arfloksins vísir á, at tingi› einki tilfar hevur um verjupolitisku stø›u Føroya, somulei›is sum verjupolitiska stø›a Føroya í sambandi vi› eina n‡ggja ríkisrættarliga skipan als ikki er vi›gjørd á tingi.

Tí ber ikki at meta um, hvørt ta› í einari n‡ggjari ríkisrættarligari stø›u er ney›ugt at gerast limur í eini verjusamgonu ella ikki, heldur Jóannes Eidesgaard, sum ivast í, um Føroyar longur hava nakran t‡dning í strategiska netinum hjá NATO.

Forma›ur Javna›arfloksins mælir løgmanni til at kunna tingi› og uttanlandsnevndina meira um NATO máli› og fáa í lag eitt kjak um hetta, solei›is at fólkaræ›i› fær sína ávirkan.

Ynskja ongar broytingar

Sjálvst‡risflokkurin heldur ta› vera best, um vit ver›a ver›andi í NATO á nøkulunda sama hátt sum nú. Partnership for Peace er ein møguleiki

JOHN JOHANNESSEN

– Sjálvst‡risflokkurin hevur altí› hildi›, at vit skulu halda okkum at NATO. Ta› gera vit framvegis, sigur Sámal Petur í Grund, forma›ur í tingbólki Sjálvst‡risfloksins.

Sámal Petur í Grund heldur, at Partnership for Peace samtaki›, sum er undir NATO, er ein hóskandi skipan hjá Føroyum at melda okkum í, fáa vit í n‡ggjari ríkisrættarligari stø›u fult ræ›i á uttanríkispolitiska økinum.

Kortini ásannar Sámal Petur í Grund, at hann enn ikki veit so miki› nógv um verupolitisku stø›u Føroya, at hann kann sta›festa, at Partnership for Peace er rætta skipanin fyri fullveldis Føroyar.

Men út frá teimum upp-l‡singum, hann higartil hevur fingi›, heldur hann hetta vera bestu loysnina.

Sámal Petur í Grund heldur ikki, at landsst‡ri› hevur bori› seg skeivt at, tá ta› seinastu tí›ina hevur kunna› seg um verjupolitisku stø›una hjá Føroyum. Hann heldur ikki, at landsst‡ri› hevur broti› tær mongu løgtingssamtyktirnar um, at vit skulu halda okkum uttan fyri NATO, hóast landsst‡ri› hevur havt samband vi› NATO.

Kortini eftirl‡sir Sámal Petur í Grund, at landsst‡ri› tekur verjupolitisku stø›una upp til kjak í løgtinginum.

Skulu sjálvsagt vera limir

Jenis av Rana heldur, at Føroyar landafrø›iliga heilt náttúrligt hoyra heima í NATO

JOHN JOHANNESSEN

Ta› var rætt av landsst‡rinum at venda sær til NATO at kanna verjupolitisku stø›una fyri Føroyar sum fullveldi.

Hetta er grei›a ni›urstø›an hjá Jenisi av Rana í sambandi vi›, landsst‡ri› hevur lati› serfrø›ingar kanna møguleikarnar fyri sjálvstø›ugum føroyskum limaskapi í NATO ella einum av undirfelagsskapum tess.

– Eg mælti sjálvur landsst‡rinum til at venda sær til NATO fyri fáum måna›um sí›ani, so eg kann ikki anna› enn taka undir vi› landsst‡rinum í hesum máli, sigur Jenis av Rana.

Mugu ikki undirmeta t‡dningin

Jenis av Rana úr Mi›flokkinum vísir á, at Føroyar uttan iva hava alstóran verjupolitiskan t‡dning fyri alt Nor›uratlantshav í dag, eins og fyrr.

Tí minnir hann politikarar á ikki at undirmeta hendan t‡dning.

Jenis av Rana tekur undir vi›, at Bretland uttan iva roknar Føroyar sum verjupolitiskt heimabeiti. Føroyar eru bretskt øki, tá hugsa› ver›ur um verjupolitikk, heldur hann.

Men kortini heldur Jenis av Rana ta› vera ney›ugt, at vit sta›festa trygd okkara formelt vi› at gerast limir í NATO ella Partnership for Peace.

Kjak í tinginum

Jenis av Rana heldur, at landsst‡ri› í størri mun átti at rá›ført seg vi› løgtingi› í sambandi› vi› verjupolitikk fyri Føroyar sum fullveldi.

– Eg haldi, at landsst‡ri› eigur at leggja máli› fyri tingi› til or›askiftis og í størri mun at kunna uttanlandsnevndina, sigur Jenis av Rana.



Eiga at luttaka meira

Edmund Joensen heldur, at Føroyar eiga at taka av tilbo›num um at luttaka í uttanríkispolitskum nevndum hjá donsku stjórnini, solei›is at vit eisini fáa ávirkan og innlit í NATO

JOHN JOHANNESSEN

Forma›ur Sambandsfloksins tr‡r ikki uppá, at Føroyar fáa størri avger›arrætt innan NATO vi› at gerast sjálvstø›ugir limir.

– Vit skulu vera limir gjøgnum Danmark og sí›ani hava okkara ávirkan vi› at vera aktiv vi› umbo›an í donskum uttanríkispolitiskum nevndum, eins og vit fingu í bo›i undir seinastu samgongu, sigur Edmund Joensen.

Hetta, heldur Edmund Joensen, hev›i givi› okkum bæ›i innlit og ávirkan á økinum.

Ney›ugt vi› limaskapi

Forma›ur Sambandsfloksins vil ikki gera vi›merkingar til, hvørja verjupolitiska stø›u, hann heldur, at vit skulu hava í einari n‡ggjari ríkisrættarligari skipan.

– Vit eru limir í ríkisfelagsskapinum, og ta› er tí, vit eiga at tosa út frá, vísir Edmund Joensen á.

Men forma›ur Sambandsfloksins stendur kortini fast vi›, at Sambandsflokkurin altí› hevur hildi›, at vit eiga at vera limir í NATO.

– Ta› ber als ikki til at hugsa, at vit kunnu vera uttan fyri NATO. Tí brestur kríggj á, so hava vit beinan vegin trygdarpolitiskan áhuga, vísir Edmund Joensen á.

Leypa tingi› um

At landsst‡ri› hevur kanna› møguleikarnar fyri sjálvstø›ugum limaskapi í NATO uttan at spyrja tingi› eftir, ta› heldur Edmund Joensen minna um einaræ›i.

– Landsst‡ri› vanvirdi tingi›, bæ›i tá ta› vendi sær til ST um fullveldismáli›, og tá løgma›ur vildi á tal vi› NATO a›alskrivaran um møguleikarnar fyri sjálvstø›ugum limaskapi í NATO, sigur Edmund Joensen.



Løgtingssamtyktirnar skulu haldast

Ta› er skeivt av landsst‡rinum, at ta› fer uttan um løgtingi› í málinum um NATO-limaskapin. Samtyktirnar hjá løgtinginum skulu haldast, sigur Jógvan Durhuus, tingma›ur fyri Tjó›veldisflokkin

EY›UN KLAKSTEIN

Løgtingi› hevur fleiri fer›ir samtykt, at Føroyar skulu halda seg uttan fyri allar herna›arligar felagsskapir, og hesar samtyktir skulu fylgjast.

Ta› sigur samgonguma›urin, Jógvan Durhuus, sum umbo›ar Tjó›veldisflokkin í løgtinginum.

- Alt, sum hevur veri› gjørt vi›víkandi NATO gjøgnum tí›irnar, er fari› uttan um løgtingi›, og ta› er púra skeivt. Ta› er eisini skeivt av landsst‡rinum,at ta› nú frá fyrsta degi fer uttan um løgtingi› í málinum um NATO-limaskap, sigur hann.

Í 1987 var Jógvan Durhuus virkandi løgma›ur í Føroyum, tá amerikanska herskipi› USS McCloy kom á Havnina. Hann nokta›i skipinum at koma í føroyskt øki›, tí Føroyar skuldu haldast uttan fyri allar herna›arligar felagskapir, og hann sigur seg hava júst somu stø›una í dag.

- Samtyktirnar hjá løgtinginum um, at vit skulu halda okkum uttan fyri NATO og a›rar herna›arligar felagsskapir, skuldu haldast, og eg ætli mær í øllum før›um at halda meg til hesar samtyktir, sigur hann.

Løgtingi› skal vi›gera og avgera

Í sambandi vi› fullveldissamrá›ingarnar vi› donsku stjórnina, hevur landsst‡ri› arbeitt vi› trygdarspurninginum, og ta› heldur, at NATO-felagsskapurin, Partnership for Peace, er ein hóskandi felagsskapur til Føroyar at ver›a í, um vit fáa fullveldi.

- Ta› er sum so í lagi, at landsst‡ri› kannar, hvørjir møguleikar eru, men máli› má leggjast fyri løgtingi› at vi›gera og taka stø›u til, sigur Jógvan Durhuus.

- Partnership for Peace ljó›ar kanska áhugavert, og ta› kann ver›a ney›ugt at ver›a vi› í slíkum felagsskapi, tá vit fáa fullveldi - millum anna› fyri at fáa diplomatiska vælvild - men hetta kann ikki gerast uttan um løgtingi›. Løgtingi› má samtykkja, at vit skulu upp í slíkan felagsskap, á›renn ta› kann koma upp á tal.

Jógvan Durhuus leggur dent á, at løgtingssamtyktirnar um, at Føroyar skulu halda seg uttan fyri allar herna›arligar felagsskapir, skulu haldast til naka› anna› ver›ur samtykt í løgtinginum.

Løgtingssamtyktirnar um, at Føroyar skulu halda seg uttan fyri allar herna›arligar felagsskapir, skulu haldast, sigur tingma›urin, Jógvan Durhuus

Mugu ikki leypa á leistum fyri NATO

- Vit mugu ansa eftir, at vit ikki uttan at vita av tí vakna sum limur í NATO, sigur Kjartan Mørkøre, ein av høvu›smonnum í Fólk fyri Fri›i

EY›UN KLAKSTEIN

Føroyingar mugu kanna máli› væl og vir›iliga, á›renn vit taka nakra stø›u til, um vit skulu ver›a limir í NATO-felagsskapinum Partnership for Peace.

Ta› heldur Kjartan Mørkøre, sum var ein av høvu›sstu›lunum í felagsskapinum Fólk fyri Fri›i. Hesin felagsskapur var nógv frammi í áttatiárunum, men seinastu nógvum árini hevur hann als ikki veri› virkin.

- Vit skulu ikki leypa á leistum fyri ta› um felagsskapurin nú eitur Partnership for Peace, og ney›ugt at er kanna væl og vir›iliga, hvat hesin felagsskapurin stendur fyri, á›renn vit taka stø›u til, um vit fara upp í hann, sigur Kjartan Mørkøre.

- Navni› ljó›ar væl - næstan sum Fólk fyri Fri›i - men um hetta bara er ein máti at fáa okkum vi› í NATO eiga vit at vera á vakt, sigur hann.

Stø›an er ein onnur

Kjartan Mørkøre vísir á, at Fólk fyri Fri›i fyrst og fremst stríddust ímóti kjarnorkuvápnum, og felagsskapurin hev›i eisini ein t‡›andi leiklut, tá løgtingi› samtykti, at Føroyar skuldu ver›a kjarnorkufrítt øki.

- Vit gingu mótmælisgongdir úr Mjørkadali, men vit royndu alla tí›ina at ansa eftir, at vit ikki fingu ø›i í fólk, sum høvdu vi› NATO at gera. Okkara høvu›smál var at strí›ast ímóti kjarnorkuvápnum, sigur Kjartan Mørkøre.

- Í dag er stø›an ein heilt onnur, enn hon var í 80'unum, tá fólk veruliga stúrdu fyri, at kjarnorkukríggj kundi bresta á. Nú tykist NATO arbei›a meira sum ein fri›arvar›veitandi felagsskapur, og tí kann eg ikki bara siga, at vit skulu halda okkum burtur. Vit skulu ikki fara upp á bakbeinini beinanvegin, men skulu kanna væl og vir›iliga, hvat hesir felagsskapir standa fyri.

Tí mælir Kjartan Mørkøre politikarum og ø›rum fólki til at arbei›a meira vi› málinum, á›renn stø›an ver›ur tikin, og kanska átti landsst‡ri› at sett ein bólk, sum kundi greina máli› nærri, heldur hann.

Kjartan Mørkøre var ein av høvu›smonnunum í felagsskapinum, Fólk fyri Fri›i, og hann heldur, at føroyingar ikki eiga at leypa á leistum, fyri ta› um felagsskapurin nú eitur Partnership for Peace. Hann mælir til at kanna gjølla, hvat hesin felagsskapur stendur fyri

-Góðir brúktir frá

REYNI SERVICE

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED. Skrás.: 30-04-98 Km.: 24.000 Prísur: 167.600,- Garanti**	TOYOTA YARIS 1,0 TERRA Skrás.: 07-05-99 Km.: 30.000 Prísur: 112.600,- Garanti**
TOYOTA CARINA E 2,0 Gli AUT. GEAR Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000 Prísur: 127.600,- Garanti*	TOYOTA YARIS 1,0 TERRA Skrás.: 21-04-99 Km.: 26.000 Prísur: 118.600,- Garanti**
TOYOTA CARINA E 1,8 Gli Skrás.: 28-06-95 Km.: 72.000 Prísur: 108.600,- Garanti* Sýnaður 12/99	VOLVO 460 SEDAN Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 6/99
TOYOTA CARINA E 1,6 GXi Skrás.: 11-09-95 Km.: 48.000 Prísur: 110.600,- Garanti* Sýnaður 5/00	HONDA CIVIC 1,4 Skrás.: 07-04-97 Km.: 52.000 Prísur: 110.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 Xli Skrás.: 12-04-96 Km.: 105.000 Prísur: 105.600,- Garanti*	MAZDA 323 DIESEL Skrás.: 04-07-97 Km.: 90.000 Prísur: 114.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 2,0 GLi SEDAN Skrás.: 17-08-92 Km.: 95.000 Prísur: 85.600,- Garanti*	FORD ESCORT 1,8 T-DIESEL STW. Skrás.: 08-10-97 Km.: 24.000 Prísur: 118.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2.0 Gli Skrás.: 02-07-90 Km.: 170.000 Prísur: 65.600,- Sýnaður 3/00	FORD ESCORT 1,8 Skrás.: 21-08-95 Km.: 81.000 Prísur: 65.600,-
TOYOTA CARINA 2,0 Gli L/B Skrás.: 14-08-91 Km.: 69.000 Prísur: 72.600,- Garanti* Sýnaður 5/99	FORD MONDEO 2,0 AIR-CON Skrás.: 02-07-96 Km.: 52.000 Prísur: 120.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2,0 Xli Skrás.: 19-10-90 Km.: 122.000 Prísur: 57.600,-	KIA SEPHIA 1,5 Skrás.: 17-04-97 Km.: 59.000 Prísur: 62.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 128.600,- Garanti**	KIA SEPHIA 1,5 Skrás.: 14-03-97 Km.: 107.000 Prísur: 58.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA Skrás.: 16-03-98 Km.: 50.000 Prísur: 112.600,- Garanti**	VOLVO 240 GL AUT. Skrás.: 04-06-86 Km.: 165.000 Prísur: 22.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA Skrás.: 01-05-95 Km.: 139.000 Prísur: 87.600,- Garanti* Sýnaður 12/99	TOYOTA COROLLA 1,3 STATION Skrás.: 13-04-92 Km.: 110.000 Prísur: 57.600,- Sýnaður 2/99
TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA Skrás.: 20-09-95 Km.: 72.000 Prísur: 85.600,- Garanti* Sýnaður 6/99	TOYOTA COROLLA 1,3 STW. Skrás.: 01-06-92 Km.: 82.000 Prísur: 62.600,- Sýnaður 8/00

VØRUVOGNAR	AVHEINTINGAR-TILBOÐ
TOYOTA HIACE 2,4 D. v/ síðurútum Skrás.: 08-09-98 Km.: 55.000 Prísur: 155.600,-	VW TRANSPORTER v/ dup. kabinu Skrás.: 17-02-87 Km.: 190.000 Prísur: 18.600,-
TOYOTA HIACE 2,4 DIESEL VAN Skrás.: 06-11-95 Km.: 122.000 Prísur: 120.600,-	NISSAN SUNNY STW. Skrás.: 13-04-89 Km.: 156.000 Prísur: 15.600,- Sýnaður 02/99
TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO Skrás.: 20-10-88 Km.: 159.000 Prísur: 99.600,- Sýnaður 8/00	FORD SIERRA 1,6 Skrás.: 10-05-89 Km.: 110.000 Prísur: 10.600,- Sýnaður 5/00
TOYOTA DYNA 150 V/LAST Skrás.: 24-02-97 Km.: 100.000 Prísur: 90.600,-	HONDA ACCORD Skrás.: 09-04-87 Km.: 179.000 Prísur: 14.600,- Sýnaður 5/98
TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL Skrás.: 05-11-86 Km.: 230.000 Prísur: 48.600,-	NISSAN BLUEBIRD Skrás.: 12-06-87 Km.: 157.000 Prísur: 17.600,- Sýnaður 8/00
TOYOTA HIACE 2,4 DIESEL VAN Skrás.: 26-05-98 Km.: 30.000 Prísur: 155.600,-	FORD ESCORT Skrás.: 14-03-88 Km.: 177.000 Prísur: 9.600,- Sýnaður 3/99
FORD COURIER DIESEL Skrás.: 22-05-94 Km.: 91.000 Prísur: 48.600,-	TOYOTA CAMRY 1,8 XL Skrás.: 30-06-88 Km.: 240.000 Prísur: 15.600,- Sýnaður 4/99
VW TARO 4x4 PICK-UP Skrás.: 05-11-91 Km.: 175.000 Prísur: 72.600,-	OPEL ASCONA 1,6 Skrás.: 01-01-87 Prísur: 3.600,-
VW LT 35 VAN Skrás.: 30-06-93 Prísur: 39.600,-	TOYOTA CARINA 1,6 DS Sýnaður 5/00 Skrás.: 09-06-87 Km.: 221.000 Prísur: 15.600,-

Støkk inn á gólvið!

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00



Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820